

## Bankar umrøða eftirlit

Leiðararnir í teimum størstu bankunum í Japan, Evropa og USA hittast í næstum í London, har teir sambært tíðindastovuni AFP skulu tosa um eftirlitið við altjóða fíggjarkervinum. Roknað verður við, at fundurin verður tann 24. mars, og tað er væl hugsandi, tí júst tá hava fíggjarmálaráðharrarnir úr 20 londum fund í London. Millum bankarnar, sum fara at senda umboð á fundin, eru JPMorgan, HCBS, og japanar hava boðað frá, at ovasta leiðslan í Mitsubishi UFJ Financial Group kemur til London. Bankafundurin og ráðharrafundurin eru fyrireiking til ríkis- og stjórnarleiðarafundin, sum verður 2. apríl.

## Kravdu sjálvræði til Katalonia

-Tað ber ikki t til at forða frælsinum. Ísland 1944, Litava 1990, Montenegro 2006, Kosovo 2008, Katalonia 201?" stóð á einum skelti, sum fólk bóru, tá tey gingu kravgongu í Bruxelles leygardagin við kravi um sjálvræði til spanska landspartin Katalonia. Belgisku myndugleikarnir halda, at næstan 3.000 fólk vóru í kravgonguni. Fleiri teirra vóru komin úr Katalonia, men har vóru eisini fólk úr øðrum økjum, sum vilja hava størri sjálvræði so sum Baskaralandið, Korsika og Skotland. Katalonski frælsisflokkurin krevur, at landsparturin fær sjálvstýri við Barcelona sum høvuðsstaði.

# - Eg væntaði mær slett ikki stjórastarvið




**Tað var ikki, fyrr enn fólk fóru at heita á Bjørn Patursson um at søkja starvið sum búnaðarstjóri, at hann setti seg niður at skriva sína umsókn. - Fólk vístu mær á, at millum reglurnar í lýsingini stóð, at royndir innan landbúnað eisini kundu viga upp ímóti einari akademiskari útbúgving, sigur Bjørn Patursson, nýggjur búnaðarstjóri í Føroyum**

LANDBÚNAÐUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Hin 1. februar í ár tók Bjørn Patursson við sum nýggjur stjóri á samanlagda stovninum Frammi í Dali í Kollafirði. Nýggi stovnurin er ein samanlegging av fyrrverandi Búnaðarstovuni og Royndarstøðini.

Stjóri á Búnaðarstovuni hevur verið Ari Johanneson, sum er farin í annað starv, og stjóri á Royndarstøðini heilt síðan 1985 hevur verið Peder T. Haahr. Peder verður knýttur at stovninum, til hann í summar fer frá vegna aldur.

Í sambandi við stjóraskifti á Búnaðarstovuni, varð skipað fyri móttøku á stovninum fríggjadagin, og her nýttu eini 160 fólk høvi at hitta nýggja stjóran og hansara starvsfólk.

Við móttøkuna var ymiskt gott at eta, og har var eisini okkurt leskandi, sum vanligt er til slíkar móttøkur.

Heilsanir vórðu bornar fram og millum tey, sum søgdu nøkur orð, vóru eitt nú fráfarni stjórin, Ari Jóhanneson og nýggi stjórin, Bjørn Patursson.

### Ovfarin stjóri

Nýggi búnaðarstjórin hevur á ymiskan hátt starvast innan føroyskan landbúnað síðan 1984. Hann er best kendur sum formaður í Bóndafelagnum gjøgnum mong ár, eins og hann hevur verið festari í Koltri seinastu 15 árini.

Bjørn Patursson sigur, at hann er sera væl nøgdur við móttøkuna, og at hann var ovfarin av, at so mong nýttu høvi til at støkka inn á gólvið.

- Eg eri sera spentur upp á hesa uppgávu, sum eg slett ikki væntaði fór at fella mær í lut.



*Malan Patursson, nýggjur festari í Koltri, saman við manni sínum, Peturi á Dul Patursson og Lykku Patursson, konu Bjørn Patursson*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Nýggi búnaðarstjórin sigur, at hann als ikki hevði væntað at fingið stjórastarvið á Búnaðarstovuni, tí hann hevur onga akademiska útbúgving.

---- Eg søkti heldur ikki starvið fyrr enn í síðstu løtu. Tað var ikki, fyrr enn fólk fóru at heita á meg um at søkja, at eg setti meg niður at skriva mína umsókn. Fólk vístu mær á, at millum reglurnar í lýsingini kundi lesast, at royndir innan landbúnað eisini kundu viga upp ímóti einari akademiskari útbúgving.

Spurdur, hvønn skúla hann annars hevur at vísa á, sum kann hava havt sín týdning fyri starvssetanina, sigur Bjørn, at hann hevur handilsskúlaprógv, umframt at hann hevur prógv í eitt nú grannskoðan á merkonomstøði.

### Fleiri samrøður

Starvið sum búnaðarstjóri er eitt alment starv, sum liggur undir aðalstjóranum í Fiskimálaráðnum, Rógva Reinert við landsstýrismanninum í fiskivinnumálum, Jacobi Vestergaard sum ovasta myndugleika.

- Eg væntaði heilt vist, at onkur við akademikaraútbúgving fór at fáa nýggja stjórastarvið, men tá samanum kom, fall starvið mær í lut, og tað eri eg sera fegin um og kenni sum stórt álit, sigur Bjørn, sum vísir á, at